## Grand Prix tónleikur í Rex

Grand Prix tónleikur verður á skránni í REX um vikuskiftið. Fríggjakvøldið verður tað Bryan Rice, sum stendur fyri tónleikinum, meðan Jens Marni band verður leygarkvøldið. Bryan Rice kemur fríggjadagin til Føroya, har hann fer at framføra í REX. REX bjóðar Grand Prix tónleik um vikuskiftið, nú tað styttist til Eurovision finaluna í Oslo. Leygarkvøldið verður Jens Marni band í REX.



## Bryan Rice í Fuglafirði

Leygarkvøldið verður Bryan Rice í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Tað er Rúni Djúrhuus, ið hevur tikið stig til hettar, og verður hettar allarhelst eitt av teimum heilt forkunnugu upplivingunum, vænta tey í Fuglafirði. Fyri at fáa eitt heilt kvøld burturúr verður ungi bólkurin Timburmenn eisini at spæla til dans.



*Høgni Højgaard er í løtuni í læru sum snikkari. - Eg veit ikki, hvat eg skal gera tá eg verði liðugur. Eg havi góðan hug at halda fram her, sigur hann*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# – Eg eri jú bara deyvur

**- Hóast vit tosa okkara okkara deyvamál og tey hoyrandi sítt tungumál, kunnu vit saktans tosa saman. Einasta treytin er, at viljin til at skilja hvønn annan er til staðar, sigur 24 ára gamli Høgni Højgaard. Hann hevur verið deyvur alt sítt lív**

DEYVUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Runavík:** - Vit eru eini 40 deyv í Føroyum. Men eg kann viðhvørt kenna meg einsamallan, sigur ungi runavíkingurin.

Likamliga brek hansara hevur hvørki tikið lívsgleðina ella vónina um eina góða framtíð frá honum.

Gerandisdagurin hjá Høgna er ikki nógv øðrvísi enn hjá javnaldrum sínum: Hann hevur lærupláss; hann hevur damu; hevur koyrikort; honum dámar væl at hyggja í sjónvarp; hann er formaður í Deyvafelagnum; og hann hevur haraftrat eitt positivt sinnalag.

- Nei, eg haldi ikki at eg havi mist nógv orsakað av deyvleika mínum. Eg hevði bara ynskt, at tað var lættari at samskifta við tey hoyrandi.

- Eg eri heldur ikki keddur av støðuni, men eg kann ofta verða irriteraður, tí eg ikki fái sagt tað sum eg ætlaði við hini, sigur Høgni Højgaard.

*Eg royndi at fáa arbeiði, men tá varð sagt, at eg mátti hava nakrar arbeiðsroyndir at vísa á. Men altso, hvussu kundi eg fáa royndir, tá eg ikki fekk nakað arbeiði?!*

Vit settu honum stevnu eitt kvøldi í Deyvahúsinum, saman við deyvatulkinum Edny Poulsen. Endamálið er at fáa hann at lýsa, hvussu gerandisdagurin er hjá einum deyvum føroyingi.

Í kvøld fær hann sagt júst tað, sum hann ætlar - og júst so um hann ætlar.

### Kløkkaðist ikki

Høgni er ein teirra sum er føddur deyvur. Hann veit, at nakað úti í familju hansara eru onnur, sum bera sama brek sum hann, m.a. brøðurnir Hermundur og Jan Zachariasen.

- Hetta sambandið er ongatíð vorðið kannað nærri, - eg veit ikki hví. Eg havi hoyrt, at summi hava kannað sína bakgrund fyri at finna fram til, hví tey eru deyv.

- Eg var deyvur, tá eg varð føddur, og eg havi so ongatíð gjørt hetta, sigur Høgni.

Hóast Høgni var føddur deyvur, heldur hann ikki, at hetta brekið hevur ávirkað hann stórvegis í barnaárunum og seinni sum unglingi.

- Mamma mín hevur fortalt mær, at eg fungeraði sum ein hoyrandi, tá eg var lítil. Tað var líka tað, at eg ikki altíð svaraði aftur, tá hon spurdi meg um nakað.

- Eg haldi, at eg mundi vera umleið tvey ár, tá tey funnu útav, at eg veruliga var deyvur. Tey plagdu at kasta okkurt niður í gólvið fyri at vita, um eg eg bleiv kløkkur av larminum.

Men Høgni reageraði als ikki uppá larmin, og soleiðis vaks illgrunin um, at okkurt bagdi hoyrn hansara. Tey fingu síðani samband við lækna fyri at gera nærri kanningar, og her varð brekið staðfest.

- Eg var totalt deyvur, men ein hevur altíð eina evarska lítla hoyrn, sum koyrir meiri uppá nøkur ávís ljóð.

### Mentist í skúlanum

Barnaárini gingu við at hann royndi ymisk sløg av hoyritólum. Og so kom dagurin, tá lítli Høgni á